Løgtingslóg

um

føroyskan førleikakarm

Virkisøki

§ 1. Løgtingslógin er galdandi fyri allar prógvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar í Føroyum.
Stk. 2. Løgtingslógin er eisini galdandi fyri skeið, sum kunnu javnsetast við tær í stk. 1 nevndu útbúgvingar.

Tann føroyski førleikakarmurin

§ 2. Navnið á førleikakarminum er tann føroyski førleikakarmurin, Faroese National Qualifications Framework, FOQF.

§ 3. Førleikakarmurin hevur átta førleikastig, sum fevna um allar prógvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar frá fólkaskúla til ph.d.-útbúgving.
Stk. 2. Førleikakrøvini eru stigvís og byggja á vitan, hegni og førleikar.

§ 4. Landsstýrisfólkið góðkennir førleikakarmin.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið flokkar útbúgvingarnar og kann gera nærri reglur um flokking av útbúgvingum.

Námsskipan, námsætlan og prógv

§ 5. Námsskipanir og námsætlanir vísa til førleikakrøvini fyri galdandi førleikastig fyri útbúgvingina.

§ 6. Prógv, sum verða útskrivað á góðkendum útbúgvingarstovni, vísa til galdandi førleikastig sambært føroyska førleikakarminum, umframt evropeiska førleikakarminum fyri lívlanga læru, the European Qualifications Framework for Lifelong Learning, EQF.
Stk. 2. Á hægri útbúgvingum verður eisini víst til førleikakarmin fyri tað evropeiska økið fyri hægri útbúgvingar, the Framework of Qualifications for the European Higher Education Area, QF-EHEA.
Stk. 3. Í teimum førum, har útbúgvingin verður tikin í samstarvi við útlendskan útbúgvingarstovn, kann eisini verða víst til galdandi førleikastig sambært útlendskum førleikakarmi.

Aðrar ásetingar

§ 7. Landsstýrisfólkið í útbúgvingarmálum ger nærri reglur um førleikakarmin, harundir um námsskipan og námsætlan, prógv, heitir og Diploma Supplement.

Gildiskoma

§ 8. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2025.

Samtykt á Løgtingi hin 2. mai 2024 við 30-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 2. mai 2024

stjóri

LM-084/2023